Klaksvíkar býráð um Haraldssund:

Gerið siglingarrennu og árinskanningar

Um Landsstýrið lurtar eftir Klaksvíkar býráð, verður Haraldssund ikki tipt. Og harvið fær Landsverkfrøðingurin ikki sín vilja

Býráðssalurin var stúgvandi fullur av fólki

Klaksvíkar býráð samtykti einmælt á almennum eykabýráðsfundi mikukvøldið at heita á Landsstýrið um at steðga við útfyllingini í Haraldssund, til skrivlig váttan fyriliggur frá Landsstýrinum, um at siglingarrenna verður gjørd. Býráðið heitir eisini á Landsstýrið um at biðja Heilsufrøðisligu Starvsstovuna o.o. um at gera árinskanningar á Pollinum og á Vágni, soleiðis at funnið verður fram til, hvussu stór siglingarrennan skal vera. Í áheitanini verður lagt aftrat, at arbeiðið viðvíkjandi øðrum, ið skal gerast norðuri á Strond, tó eigur at halda fram.

Tað er fyrst og fremst Klaksvíkar Útróðrarfelagi fyri at takka, at spurningurin um siglingarrennu nú er tikin fram aftur. Fyri stuttum heitti útróðrarfelagið á Landsstýrið um ikki at tippa Haraldssund, fyrr enn várróðurin er av. Tað førdi til fund millum útróðrarfelagið og Landsstýrið, og síðan kallaði Landsstýrið Klaksvíkar býráð inn til fundar. Landsstýrið heitti tá á býráðið um at siga sína hugsan, hvat gerast skal í Haraldssundi. Tí var fundurin mikukvøldið.

Sjáldan hevur so nógv fólk verið á býráðsfundi í Klaksvík, eini 150 fólk varð mett, og av teimum vóru nógvir útróðrarmenn, sum bera ótta fyri, at vinnumøguleikar teirra verða nógv skerdir, um sundið verður tipt.

Klaksvíkar býráð hevur ongantíð verið fyri at steingja Haraldssund. Á heysti 1983 samtykt býráðið at taka undir við Landsstýrinum um at fyllast skuldi frá Borðoyarlandinum 75 pst. út í sundið, og at støða síðan skuldi takast til siglingarrennu. Hesa støðu hevði tó ikki eitt samt býráð, m.a. var Jógvan við Keldu, býráðsformaður, fyri at tippa.

Landsverkfrøðingurin vildi tippa

Sum nevnt varð fleiri ferðir á fundinum, hevur Landsverkfrøðingurin ongantíð ætlað, at nøkur siglingarrenna skuldi gerast. Á einum fundi við Klaksvíkar býráð í 1983 segði Mikkjal Helmsdal, at vildu klaksvíkingar ikki hava byrging um Haraldssund uttan rennu, fingu teir einki, tí rennan fór at verða dýr at gera. Um somu tíð segði hann tó í samrøðu við útvarpið, at Landsverkfrøðingurin ikki var myndugleiki men ein stovnur, ið skuldi gera tað, ið landsmyndugleikarnir áløgdu honum.

Jógvan við Keldu, býráðsformaður, segði á fundinum, at málið snúði seg um meira enn útróður, og tí atkvøddi hann einu ferðina fyri at tippa. Klaksvíkar býráð hevur ætlanir um at gera góðshavn norðuri á Strond, har idnaðarøki eisini skal vera.

— Ein siglingarrenna fer ikki at vera til bága fyri nakra havn, helt Álvur Zachariasen. Myndirnar, sum sjónvarpið vísti, prógvaðu, hvussu lítil streymur er við Borðoyarlandið, eftir at útfyllingin er gjørd.

Útróðurin

Nógv varð tosað um útróðurin norðanfyri. Útróðrarmenninir vilja hava møguleika fyri at kunna fara gjøgnum Haraldssund. Tað skylda vit teimum, segði Álvur Zachariasen. Óli Heinesen segði, at hann hevði gjørt eina leysliga meting yvir, hvønn týdning várróðurin hevði fyri útróðrarmenninar. Várróðurin er eitt gott iskoyti, og verður tipt, og eingin várróður, minkar inntøkan hjá teimum munandi, segði hann.

Og verður tipt, verður neyðugt at gera eina bátahavn norðanfyri. Hon kostar minst lika nógv sum siglingarrennan, helt Árni Jacobsen.

Dálkingarvandin

Samrøðan við Arne Nørrevang í sjónvarpinum seinasta vikuskiftið og í myndablaðnum Nú vórðu nógv umrøddar. Tað endurgav Karl Heri Joensen gjølla.

— Vandi er fyri, at Vágin og Pollurn verður eitt stórt runudíki. Kavarar siga, at í teirra tíð er vágin nógv broytt til tað verra, m.a. tí kloakkir renna út á sjógv. Tí mugu kanningar gerast, segði Karl Heri.

Óli Heinesen segði, at tað átti at verið óneyðugt at tikið spurningin uppaftur nú. Tað varð jú samtykt, at bara 75 pst. skuldu fyllast út í sundið.

— en tað er tíverri neyðugt, tí vit kunnu ikki kenna okkum trygg, segði hann, og nevndi Hvannasund sum dømi. Tá tann byrgingin varð gjørd, bleiv sagt, at ein siglingarrenna altíð kundi gerast. Tað er ikki hent.

Haraftrat er byrjað at fylla grót út frá Kunoyarlandinum. Eingin samtykt er gjørd um tað. Væl hevði borið til at byrja



Samtykt varð í 1983, at fyllast skuldi út í Haraldssund frá Borðoyarlandinum. Arbeiðið byrjaði í fjør. Nú er kortini nógv eisini fylt út í sundið frá Kunoyarlandinum